Landsbanki Føroya
Frágreiðing 1999
Búskaparpolitikkur í Føroyum

INNIHALD

Samandráttur 2
Inngangur 4
Búskapargongdin síðani 1985 4
Búskaparpolitikkur 5
Pengapolitikkur 6
Gjaldoyrapolitikkur 7
Fíggjarpolitikkur 8
Inntøkupolitikkur 8
Vinnupolitikkur 9
Førdur búskaparpolitikkur 10
1985-89 13
1990-92 15
1993-94 17
1995-98 18
Meting um búskaparpolitikkin 20
Ávirkan á eftirspurningin 20
Ávirkan á útboðið 21
Samantak 22
Sveiggj og úrtøka 23
Útlit og búskaparpolitikkur 25

Samandráttur

1. Tann búskaparliga gongdin í Føroyum árini 1985-1998 verður lýst við gongdini í útgoldnum lønum, sum verða býttar í tveir høvuðsbólkar, útflutningsvinnur og eftirspurningsvinnur. Broytingarnar ella sveiggini í føroyska búskapinum hava verið stór hesa tíðina.

Vert er at geva gætur, at broytingarnar hava verið nógv størri í eftirspurningsvinnunum enn í útflutningsvinnunum. Broytingarnar í eftirspurningsvinnum vóru +1.300 mkr frá 1985 til endan av 1989, síðan -1.000 mkr til endan av 1994 og síðan aftur +600 mkr til ársenda 1998. Í útflutningsvinnum vóru broytingarnar til endan av 1991 +100 mkr, síðan til endan av 1993 -400 mkr og harnæst til ársenda 1998 +400 mkr. Lagt eigur at verða til merkis, at niðurgongdin byrjaði í eftirspurningsvinnunum í 1990. Hetta hongur saman við, at studningarnir til fiskivinnuna vórðu hækkaðir í 1988 og vórðu hildnir høgir til 1991. Hetta merkir, at vóru studningarnir ikki hækkaðir, hevði niðurgongdin byrjað í 1988 í útflutningsvinnum.

Vanliga verður sagt, at Føroyar eru viðbreknar, tí tær eru so eintáttað knýttar at fiskivinnu, men tølini vísa, at tað eru eftirspurningsvinnurnar, sum hava gjørt búskapin umleypandi árini 1985-1998.

2. Nakrar høvuðsgreinar í búskaparpolitikki verða umrøddar. Tær eru pengapolitikkur, fíggjarpolitikkur, inntøkupolitikkur, vinnupolitikkur og gjaldoyrapolitikkur. Endamálið við hesum politikkum er oftast at ávirka annaðhvørt eftirspurningin ella útboðið til tess at fremja tillagingar í búskapinum. Konjunkturpolitikkur er mangan at ávirka eftirspurningin, so búskapurin lagar seg skjótt, meðan bygnaðarpolitikkur mangan er at ávirka útboðið til tess at fáa eina varandi tillaging í búskapinum, t.d. at styrkja kappingarførið. Havast skal tó í huga, at búskaparlig inntriv sjáldan eru so beinrakin, at t.d. eitt konjunkturpolitiskt tiltak bert hevur ávirkan í eftirspurningin. Mangan verður útboðið eisini ávirkað.

Høvuðsstevnan við búskaparpolitikki er tí aloftast at minka um sveiggini í búskapinum við konjunkturpolitikki og at styrkja um kappingaførið við strukturpolitikki ella bygnaðarpolitikki.

3. Við støði í gongdini í lønartølunum og myndum av árligum broytingum í eitt nú landskassans roknskapi og í útlánsvirkseminum í fíggjarmarknaðinum verður gjørd ein lýsing av førdum búskaparpolitikki og teirri ávirkan, hann hevur havt á gongdina.

Sum heild kann sigast, at tann førdi politikkurin frá 1981 til 1998 hevur skundað undir gongdina í búskapinum, bæði tá framgongd hevur verið, og tá afturgongd hevur verið.

Roynt hevur verið at mótvirka konjunkturgongdini. Í 1987 varð minkað um eftirspurningin við øktum avgjøldum, men á øðrum økjum økti politikkurin enn meira um eftirspurningin, og politikkurin nart ikki við útlánsvøksturin hjá peningastovnum og realkreditfeløgum. Í 1991-92 varð roynt at reka ein rúmari fíggjarpolitikk, men orkan í búskapinum var so niður undir komin av tí stóru skuldini, at tiltøkini megnaðu ikki at forða niðurgongdini. Tað má tí sigast, at hesar royndirnar hava ikki munað nógv í tí førda búskaparpolitikkinum og hava tí fingið lítla ávirkan á samlaðu gongdina.

Útboðssíðan í føroyska búskapinum hevur verið til umrøðu, og serstakliga við studningum hevur verið roynt at styrkja kappingarførið hjá útflutningsvinnum. Studningurin hevði ikki við sær, at tillagingarevnini í útflutningsvinnunum vórðu styrkt. Bankabjargingarnar í 1992-93 og umskipanin av skuldini hjá fyritøkum, sum kom aftaná, er størsta ítak, sum hevur havt ávirkan í útboðssíðuna í føroyska búskapinum. Nógv bendir tí á, at ávirkanin í útboðið og kappingarførið er ikki komin av miðvísum politikki, men heldur hevur staðist av gongdini í eftirspurninginum.

Tá virkini fingu skuldina umskipaða, mentist kappingarførið hjá fyritøkunum í bæði útflutningsvinnum og eftirspurningsvinnum nógv. Mangt bendir á, at hetta er ein av høvuðsgrundunum til, at búskaparvøksturin tók seg so skjótt upp eftir 1994.

Útgoldnu lønirnar í eftirspurningsvinnunum eru síðan 1995 øktar hálvaaðru ferð tað, sum lønirnar eru øktar í útflutningsvinnunum. Tí bendir nógv á, at tað eru tann ávirkanin, sum skuldarsaneringin hevur havt á kappingarførið, og tann ávirkanin, sum skattalækkingarnar hava havt á eftirspurningin, sum hava skapt framgongdina í búskapinum saman við tí, at fiskastovnarnir hava verið betri fyri.

4. Mørk eru fyri, hvat einhvør búskapur orkar, og hetta hevur við sær, at inntøkur kunna fara fyri bakka, um ov stór sveiggj vera loyvd. Tað merkir aftur, at nakað kann vinnast við einum miðvísum politikki, sum hevur sum mál at minka um sveiggini.

5. Búskapurin er í løtuni í stórum vøkstri. Útgoldnu lønirnar vaksa við einum 10 prosentum fyri árið. Tí er ikki ráðiligt at seta meira ferð á búskapin.

Skattapolitikkurin hjá landinum er ikki so stimbrandi longur, men onnur viðurskifti virka stimbrandi, t.d. vaksa útreiðslurnar hjá kommunum, fíggingarkostnaður er fallandi, inngjaldið til ALS er lækkað, eins og teir nýggju lønarsáttmálarnir geva meira í løn. Hetta eru viðurskifti, sum tala fyri tiltøkum at avmarka eftirspurningin.

Óvissan um, hvussu leingi framgongdin í fiskivinnuni fer at halda sær, elvir eisini til óvissu um tørvin á avmarkandi tiltøkum. Minka veiðunøgdirnar og lækka fiskaprísirnir verður eftirspurningurin minni, og tí verða avmarkandi tiltøk ikki so neyðug.

Íløgurnar hava leingi verið smáar. Vaksa tær, veksur eftirspurningurin.

Fyrilit, sum tey, ið her eru nevnd, hava ikki verið frammarlaga í huganum, tá búskaparpolitikkurin hevur verið lagdur til rættis.

Mælt verður tí til, at landsstýrið og løgtingið seta sær fyri at hava eina mannagongd, sum tryggjar, at tílík fyrilit altíð verða tikin við, tá búskaparpolitikkurin verður viðgjørdur.

Inngangur

Í øllum búskapum henda broytingar av og á t.d. í arbeiðsloysi, gjaldsjavna og framleiðslu. Ikki ber til at fyribyrgja teimum heilt, men royndir í øðrum londum vísa, at til ber at tálma hesum broytingum ella sveiggjum. Búskaparpolitikkur er eitt nú at royna at javna broytingar í búskapinum.

Búskaparteoretikarar eru, sum halda tað vera skeivt at reka búskaparpolitikk[1]. Tað er ikki sjónarmiðið í hesari frágreiðingini, men búskaparpolitikkur, sum verður rikin til tess at fáa ávísa ávirkan á einum øki, kann hava óhepna ávirkan á øðrum økjum. Í Føroyum hava vit havt sera stór umskifti og broytingar í búskapinum. Í 80-unum høvdu vit ovurstórt virksemi við stórliga vaksandi skuld, og í 90-unum fingu vit av ringastu niðurgangstíðum, og oman á tað skuldi skuldin gjaldast aftur. Sjálvt um búskaparpolitikkurin m.a. hevur havt til endamáls at javna sveiggini, má ásannast, at úrslitið hevur verið tað øvugta.

Í frágreiðingini verða ymsir tættir í búskapinum lýstir. Fyrst verður hugt at búskapargongdini síðan 1985. Síðan verða nøkur búskaparpolitisk amboð lýst, og greitt verður frá, hvussu tey eru brúkt í Føroyum. Mett verður um búskaparpolitikkin og mett verður eisini um útlitini fyri og tørvin á búskaparpolitikki í løtuni.

Búskapargongdin síðani 1985

Føroyar hava sum nevnt hesi seinastu árini verið fyri stórum umskiftum og broytingum í búskapinum. Hagtøl fyri útgoldnar lønir í Føroyum eru tøk fyri tíðina síðani 1984, tá samtíðarskatturin varð settur í verk. Hesi tøl eru góð og álítandi hagtøl um gongdina í búskapinum. Nógvar sundurgreiningar kunnu gerast. Mest vanliga sundurgreiningin er eitt sektorbýti við 23 vinnugreinum. Har sæst mangt áhugavert, m.a. hvussu tær ymisku greinarnar í vinnuni hava klárað seg hvør sær í mun til hvørja aðra.

Í hesi frágreiðingini verður útgangsstøði tikið í einum tvíbýti av vinnunum í Føroyum.

Annað býtið fevnir um tær vinnur, ið mest verða ávirkaðar av innlendskum eftirspurningi, tvs. vinnur ið veita vørur og tænastur til húsarhald og vinnur, bæði til íløgur og nýtslu.

Hitt býtið fevnir um vinnur, sum framleiða til útflutnings. Fyrst og fremst fiskivinna á sjógvi og landi.

Í mynd 1 er lønargongdin 1985-1998 víst fyri innlendskar eftirspurningsvinnur og útflutningsvinnur. Fyri hvønn av hesum vinnubólkunum er víst ein kløn strika, ið vísir hvussu lønirnar skifta gjøgnum árið, og ein tjykkri strika, sum vísir miðal fyri 12 mánaðir. Strikan við árligu miðaltølunum hevur størsta áhugan her.

Frá 1985 til 1989 vuksu útgoldnu lønirnar í innlendskum eftirspurningsvinnum sera nógv, meðan útflutningsvinnurnar nærum stóðu í stað samanlagt. Í 1989 vóru útgoldnu lønirnar í hæddini, og í 1990 fóru tær at minka í innlendsku eftirspurningsvinnunum. Í útflutningsvinnunum stóðu lønirnar í stað ella høvdu hug at vaksa fram til seint í 1991, tó at studningarnarnir vóru stórir hesi árini. Tað er sostatt staðfest, at niðurgongdin í føroyska búskapinum byrjaði í innlendsku eftirspurningsvinnunum og ikki í útflutningsvinnunum, sum ofta hevur verið sagt. Tó skal viðmerkjast, at niðurgongdin í fiskivinnuni hevði komið í 1988, um studningarnir ikki vórðu øktir munandi.

[1] M.a. neo-klassikarar og nakrir monetaristar halda at búskaparpolitikkur virkar ikki.



MYND 1

Lønir og hýrur í útflutningsvinnunum fóru at minka álvarsliga í 1992. Hetta stóðst av fiskaloysi, fallandi prísum og stórari skuld í fiskivinnufyritøkum. Nógv skip vóru bundin við bryggju, tá fígging fekst ikki til raksturin. Studningarnir minkaðu, bankarnir vóru í svárum trupulleikum og vórðu endurstovnaðir. Lønirnar í hesum vinnum minkaðu til fyrst í 1994. Lønirnar í innlendsku eftirspurningsvinnunum minkaðu framvegis í 1992, men í 1993 minkaðu lønirnar serliga nógv (16%), og í 1994 minkaðu tær nakað afturat til tær rukku lágmarkið síðst í árinum. Tað var endurreisingaravtalan millum landsstýrið og donsku stjórnina og táttingin av politikkinum, sum elvdi til hesa niðurgongdina í 1993 og 94.

Lønirnar í útflutningsvinnunum hava verið í vøkstri síðan fyrst í 1994, og við árslok 1998 vóru tær tær somu, sum tær vóru síðst í 1991, hóast studningarnir úr landskassanum vóru nógv minni enn tá. Meira fiskur og betri prísir eru ein týðandi partur av frágreiðingini, men skuldarsaneringar eftir bankabjargingarnar hava helst gjørt reiðaravirkini meira lønandi, og hava økt um virknu veiðuorkuna serstakliga sammett við 1992-93. Í innlendsku eftirspurningsvinnunum hava lønirnar verið í vøkstri síðan fyrst í 1995, og við ársenda 1998 vóru tær út við 90% av hámarkinum í 1989.

Mangan verður sagt, at Føroyar eru so eintáttað knýttar at fiskivinnu, at størri ótryggleiki er fyri inntøkunum í samfelagnum enn í londum við meira fjølbroyttum vinnugrundalag. Nógv er ivaleyst um tað, men gongdin í føroyska búskapinum seinastu 20 árini vísir, at sjónarmiðið er ikki bara rætt. Í mynd 1 kann tíðarskeiðið 1985 - 1998 býtast í trý skeið við uppgongd, niðurgongd og uppgongd bæði fyri eftirspurnings- og útflutningsvinnur. Toppur og botnur falla tó ikki saman í tíð fyri hesar vinnur:

Skeið	Fyrsta	Annað	Triðja
Útflutningsvinnur	+ 100 mkr	- 400 mkr	+ 400 mkr
Eftirspurningsvinnur	+ 1.300 mkr	- 1.000 mkr	+ 600 mkr

Broytingarnar hava verið væl størri í eftirspurningsvinnunum enn í útflutningsvinnunum. Ein skuldi trúð, at tað var lættari at stýra eftirspurningsvinnunum enn útflutningsvinnunum, tí tær seinnu byggja á hitt livandi tilfeingið fisk, sum hevur sínar egnu góðu og ringu tíðir. Í staðin fyri at javna sveiggini frá útflutningsvinnunum, hava eftirspurningsvinnurnar hesa tíðina gjørt búskapin meira umleypandi.

Búskaparpolitikkur

Búskaparpolitikkur kann lýsast sum royndin hjá myndugleikum at ávirka gongdina í búskapinum. Búskaparpolitikkurin kann býtast í nakrar høvuðsbólkar. Her verða fimm tílíkir bólkar umrøddir: pengapolitikkur, fíggjarpolitikkur, inntøkupolitikkur, vinnupolitikkur og gjaldoyrapolitikkur.

Føroyskir myndugleikar kunnu ikki reka gjaldoyrapolitikk, tí vit eru í gjaldoyrasamgongu við Danmark, men hinar fýra bólkarnir kunnu brúkast til at ávirka gongdina í búskapinum. Hesir bólkar eru tó ikki nóg greitt uppbýttir, tí fleiri búskaparpolitisk tiltøk kunnu sigast at koma undir meira enn ein høvuðsbólk.

Í búskaparpolitikki verður eitt nú hugsað um, hvussu politikkurin ávirkar konjunkturarnar eftir stuttari tíð, og hvussu hann ávirkar bygnaðin í samfelagnum í longri framtíð. Í stutttíðar- ella konjunkturpolitikkinum verður aloftast roynt at ávirka eftirspurningin í samfelagnum, tó at tað eisini kemur fyri at roynt verður at ávirka útboðið. Í langtíðar- ella bygnaðarpolitikkinum liggur høvuðsdenturin á at styrkja útboðssíðuna í búskapinum. Eftirspurningur og útboð eru sostatt tvey týðandi hugtøk í búskaparfrøðini.

Eftirspurningur er eftirspurningur eftir vørum og tænastum til nýtslu og íløgur hjá privatum og almennum fyritøkum og stovnum og hjá húsarhaldum, innanlands ella uttanlands, og eisini eftirspurningur eftir arbeiðsmegi. Við eftirspurningspolitikki verður roynt at ávirka ta innlendsku peninganýtsluna hjá teimum, ið ráða yvir pengum, og á tann hátt at ávirka virksemið og eftirspurningin eftir arbeiðsmegi í landinum.

Útboð er útboð av vørum og tænastum frá innlendskum og útlendskum framleiðarum. Arbeiðsmegin verður eisini boðin út til innlendskar og útlendskar arbeiðsgevarar. Útboðspolitikkur snýr seg tí ofta um at styrkja tann innlendska framleiðsluførleikan mótvegis tí útlendska.

Pengapolitikkur, gjaldoyrapolitikkur og fíggjarpolitikkur verða vanliga roknað sum konjunkturpolitisk amboð, sum verða brúkt fyri at ávirka eftirspurningin í samfelagnum. Hinvegin verða inntøkupolitikkur og vinnupolitikkur vanliga roknað sum bygnaðarpolitisk amboð, sum verða brúkt til tess at fáa ávirkan á útboðið.

Pengapolitikkur

Pengapolitikkur snýr seg um at stilla og ávirka fíggingarmøguleikar og fíggjarvirksemi. Høvuðsgreinin í pengapolitikkinum hevur sum mál at fáa tryggleika í penga- og fíggjarviðurskifti eins og javnvág í búskapin. Í fleiri londum hevur tjóðbankin ábyrgdina av hesi høvuðsgreinini í pengapolitikkinum og skal virka fyri, at pengapolitikkurin saman við búskaparpolitikkinum hjá stjórnini tryggjar støðugan búskap.

Tjóðbankin avger, um hann vil hava tátt ella rúmt samfelagsgjaldføri, og til hetta hevur hann nøkur amboð:
1) hann selur ella keypir lánsbrøv, so pengamongdin passar so nøkulunda til tørvin. Hesin handil er lítil í mun til allan handilin við lánsbrøvum og øll útistandindi lánsbrøvini. Tí ávirkar hesin handilin hjá tjóðbankanum ikki rentuna.
2) hann selur ella keypir virðisbrøv á peningamarknaðinum við stuttari afturgjaldstíð. Í hesum føri er tjóðbankans virksemi stórt í mun til tað, sum peningastovnar og fíggjarstovnar hava brúk fyri av gjaldføri, og tí ávirkast rentan á hesum stuttu virðisbrøvum.
3) hann bjóðar peningastovnunum konti, har teir kunnu hava positivt ella negativt millumverandi innistandandi fyri rentu, sum tjóðbankin ásetir.

Tað, sum er umráðandi í hesum føri, er at samvirka so væl við marknaðin, at peningastovnar og fíggjarstovnar broyta rentuna til sínar kundar, tá tjóðbankin broytir sína. Tað er tann stutta rentan, sum verður ávirkað av pengapolitikkinum, meðan tann langa rentan verður ásett á marknaðinum.

Tey seinastu 30 árini er pengapolitikkurin sera nógv broyttur í framkomnum londum. Fyrr var heilt vanligt, at serskipanir vóru til fígging av vinnuligum virksemi (ofta serskipanir til hvørja vinnugrein)

ella til ávís endamál (t.d. íbúðir), men tílíkar serskipanir eru vorðnar færri, og størri dentur er lagdur á politikkin, sum tryggjar ein støðugan búskap.

Verður rentan ávirkað, ávirkast fíggingarkostnaðurin. Hetta ávirkar aftur eftirspurningin, men samstundis verður eisini kappingarførið millum innlendskt og útlendsk fíggingarútboð ávirkað, tí pengapolitikkurin, sum hann er lýstur her, ávirkar rentuna innanfyri valutaøkið.

Føroyar eru í valutaøki saman við Danmark, og tjóðbankin førir sama pengapolitikk fyri alt gjaldoyraøkið. Føroyskir peninga- og fíggjarstovnar eins og vanligar fyritøkur kunnu frítt gera fíggjaríløgur í Danmark, eins og tær kunnu læna har, um tær hava kreditvirði til tað. Hetta ger ikki, at tú ikki kanst føra pengapolitikk í Føroyum, men hesi viðurskifti avmarka, hvussu tú kanst reka pengapolitikk.

Í dag eru ikki so nógvar serskipanir í Føroyum, men nakrar. Rentuskattaskipanin er ein stuðul til fíggjaruppsparing og samstundis ein stuðul til føroyskar peningastovnar, tí hon styrkir teirra kappingarføri mótvegis útlendskum stovnum og øðrum fíggjaríløgum. Trygging er í dag fræls, men hevur til fyri stuttum verið monopolvirksemi. Sethúsafígging er avmarkað til føroyskar lánistovnar og rentustuðul til sethúsalán avmarkar fíggjarkostnaðin á hesum øki. Teir almennu lánistovnarnir eru serskipanir hvør á sínum øki, men teir eru ikki so virknir, sum teir hava verið. Hesar serskipanir hava gjørt sítt til, at føroyski fíggjarmarknaðurin virkar á sín sermerkta hátt. Fólk og fyritøkur hava í Føroyum lítið úrval av møguleikum innan fíggjaríløgur (vælkendir møguleikar aðrastaðni eru lánsbrøv og partabrøv).

Møguleikarnir at føra pengapolitiskan konjunkturpolitikk eru avmarkaðir, men nakrir møguleikar eru við umsiting av almennum gjaldføri. Hitt almenna í Føroyum eigur heilt fitt av gjaldførum peningi. Landsbankin ræður yvir stívliga helvtini av hesum peningi, og umsitur peningin við atliti til samfelagsgjaldføri og avkast. Landsbankin hevur flutt gjaldføri av landinum, men tann parturin av almennu pengunum, sum landsbankin ikki ræður yvir, verður ikki umsitin við gjaldførinum í huga. Tí hevur hitt almenna alt ikki ta konjunkturávirkan við gjaldførinum, sum tað kundi havt.

Sum dømi um at pengapolitikkur eisini kann vera bygnaðarpolitikkur, kann nevnast, at myndugleikarnir kunnu fremja fyriskipanir, sum broyta virkisháttin á fíggjarmarknaðinum, t.d. við at stovna ein virðisbrævamarknað.

Gjaldoyrapolitikkur

Gjaldoyrapolitikkurin verður roknaður sum partur av pengapolitikkinum, tá tað snýr seg um útboðið. Roynt verður at styrkja kappingarførið hjá vinnuni við at niðurskriva gjaldoyrað, tí tá verða vørurnar bíligari í útlondum. Niðurskriving av gjaldoyranum hevur inflatión við sær, tí útlendskar vørur gerast dýrari, og tað hevur vístseg, at onnur lond ofta noyðast at svara aftur við niðurskriving av sínum gjaldoyra. Tað hevur tí vístseg, at samlaða úrslitið av gjaldoyrapolitikki mangan hevur verið prísvøkstur hjá øllum londunum, og onki land hevur fingið betri kappingarføri.

Føroyar kunnu ikki føra sjálvstøðugan gjaldoyrapolitikk, tí vit hava ikki sjálvstøðugt gjaldoyra. Hinvegin hava vit verið ávirkað av gjaldoyrapolitikkinum hjá Danmark. Danmark hevur síðani fyrru oljuprískreppuna í fyrru helvt av 1970-unum rikið ein støðugt meira liberalan gjaldoyrapolitikk, har formligar forðingar fyri fíggjarsamstarvi hjá vinnulívi og einstaklingum við útlond eru tiknar burtur. Hetta er gjørt í altjóða samstarvi í m.a. felagsskapunum OECD og ES við tí endamáli at lætta um altjóða handil og fíggjarsamstarv. Eitt sindur seinni enn í Danmark vórðu forðingarnar eisini tiknar burtur fyri føroyingar.

Gongdin hevur annars eisini verið tann, at lond eru vorðin meira varin við at broyta virðið á gjaldoyranum. Hetta kemst av, at eitt betri álit á trygt gjaldoyravirði gevur lægri fíggingar- og samhandilskostnað, sum eisini hevur týdning fyri kappingarførið.

Fíggjarpolitikkur

Í fíggjarpolitikkinum verður eftirspurningurin í samfelagnum ávirkaður við útreiðslum og inntøkum hjá tí almenna (tvs. landi, kommunum og sosialum trygdarskipanum). Hetta kann annaðhvørt gerast við at broyta inntøkurnar sum skattir, avgjøld ella onnur gjøld, ella við at broyta útreiðslurnar, sum eru a) rakstur av stovnum, b) íløgur, c) studningur til vinnu ella d) veitingar til einstaklingar.

Broytir tú útreiðslurnar til rakstur ella til íløgur, fær broytingin beinleiðis árin á eftirspurningin. Broytir tú skattir, avgjøld ella veitingar til einstaklingar, verður árinið stýrt av nýtslukvotuni hjá teimum, sum verða rakt av teim almennu tiltøkunum. Broytir tú studningar til vinnu, verður eftirspurningurin ávirkaður í tann mun, virkir ikki steðga ella sleppa undan at minka um sítt virksemi. Her er talan um stutttíðarávirkanina á eftirspurningin.

Tá konjunkturpolitikkurin verður lagdur til rættis, skal havast í huga, at fíggjarpolitikkurin eisini hevur langtíðarávirkan. Tað er t.d. lættari at økja um almennar rakstrarútreiðslur enn at minka um tær, og tað hevur við sær, at í flestu londum veksur almenni sektorurin í mun til privata sektorin. Flestar almennar nýíløgur hava vaksandi rakstrarútreiðslur við sær. Vaksandi almennur sektorur krevur vaksandi skattatrýst, sum aftur krevur produktivitetsvøkstur í privatu vinnuni, skal hon standa seg í altjóða kappingini. Sosialar veitingar, ið skapa trygdarnet fyri fólk langt upp í miðalinntøkurnar, minka um tørvin á privatari uppsparing, og fáa nýtsluna at vaksa sum partur av inntøkuni. Vinnuligir studningar minka um tørvin á rationalisering og produktivitetsvøkstri og forða tí fyri at økja um vinnuliga kappingarførið, verður studningurin ikki uppihildin. Alt hetta skal umhugsast, tá farið verður undir at fremja fíggjarpolitikk, sum er ætlaður at virka ímóti konjukturunum.

Í tann mun, fíggjarpolitikkurin fær ávirkan á uppsparingaratburðin hjá fólki og fyritøkum, hevur hann eisini pengapolitiska ávirkan.

Tað eru landsstýrið og løgtingið, sum hava ábyrgdina av fíggjarpolitikkinum í Føroyum. Fíggjarpolitikkurin er tað sterkasta konjunkturpolitiska amboðið, og landsmyndugleikarnir hava fult lóggávuræði yvir honum.

Tað kann ikki sigast, at konjunkturpolitiska endamálið hevur staðið sterkt í føroyskum fíggjarpolitikki, tó at ávirkanin á konjunkturarnar hevur verið stór, t.d. bæði í 1980-unum og 1990-unum.

Inntøkupolitikkur

Við inntøkupolitikki verður roynt at ávirka inntøkur og prísir. Endamálið við inntøkupolitikki hevur aloftast verið at halda vøkstrinum í prísum og framleiðslukostnaði á einum lægri stigi, enn hann annars hevði verið. Við øðrum orðum er endamálið at styrkja um útboðssíðuna ella kappingarførið í búskapinum.

Inntøkupolitisku amboðini, sum hava verið brúkt, eru ógvuliga ymisk og kunnu vera bæði sterk og veik. Ikki er ókent, at semingsuppskot til lønarsáttmálar eru sett í gildi við lóg, ella at prís- og/ella vinningssteðgur eru sett í gildi við lóg. Hinvegin er heldur ikki ókent at myndugleikar heita á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um at halda aftur í lønarkrøvum ella boða teimum frá, hvørjar prís- og lønarhækkingar búskapurin tolir, áðrenn tær elva til inflasjón og arbeiðsloysi.

Búskaparfrøðingar eru í øllum teoriskúlum, sum ivast nógv í, um nakar dugur er í at reka inntøkupolitikk. Hinvegin eru nakrir búskaparfrøðingar millum monetaristar og keynesianarar, sum halda, at inntøkupolitikkur kann brúkast sum stuðul eina stutta tíð, meðan høvuðsdenturin skal liggja á fíggjar- og pengapolitikki. Nakrir búskaparfrøðingar í keynesskúlanum leggja dent á, at felagsskapir hjá arbeiðsfólki og fyritøkum hava monopolmakt, og tí er tað neyðugt í inntøkupolitikki at hava hetta í huga. Lutvíst er tað neyðugt at byggja upp trúvirði millum partarnar við førdum politikki, og lutvíst er tað neyðugt við bygnaðartiltøkum at minka um stívleikar, sum standast av monopolmakt.

Í Noregi er siðvenja at seta semingsuppskot í gildi við lóg. Eisini í Danmark hevur hetta verið brúkt, men eitt sindur minni. Í Føroyum hevur tað komið fyri nakrar ferðir, at semingsuppskot eru sett í gildi við lóg. Í fleiri førum hevur løgtingið samtykt lógir um prís- og/ella vinningssteðg í sambandi við seming á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrið, sum sat frá 1995 til 1998, brúkti fleiri ferðir ynskið um lønarafturhald sum grund fyri skattalættum, sum vórðu framdir. Tað kann tí eisini sigast, at í Føroyum er siðvenja, at myndugleikarnir leggja upp í lønarsamráðingar.

Í fleiri evropeiskum londum hava stívleikar á arbeiðsmarknaðinum fört til, at arbeiðsloysið er sera stórt og trupult at fáa bilbukt við. Inntøkupolitikkur og samstarvshættir millum myndugleikar og vinnufeløg verða hildnir at eiga týðandi lut í hesum. Í Føroyum hevur mobiliteturin á arbeiðsmarknaðinum verið stórur, tvs. at fólk hava havt lætt við at flyta millum arbeiði í ymiskum vinnugreinum ella økjum. Tá arbeiðsloysisskipanin varð sett á stovn í 1992, varð roynt at hava hetta í huga. Tí er einki landafrøðiligt ella fakligt uppbýti í skipanini.

Stovnsetingin av arbeiðsloysisskipanini kann eisini sigast at vera eitt arbeiðsmarknaðarpolitiskt tiltak. Yvirgongdin ímillum inntøkupolitikk og arbeiðsmarknaðarpolitikk er ofta glíðandi. Tað sama kann sigast um yvirgongdina millum inntøkupolitikk og vinnupolitikk, sum verður viðgjørdur í næsta broti.

Vinnupolitikkur

Við vinnupolitikki verður roynt at ávirka virkisumstøðurnar hjá teimum einstøku fyritøkunum. Hetta kann verða gjørt við at skapa almennar karmar fyri alt vinnuligt virksemi, ella við at fremja ávís tiltøk fyri ávisar vinnugreinir ella fyritøkur, ikki minst í sambandi við kreppuloysnir.

Tað hevur verið eitt sindur ymiskt í ymsum londum, um høvuðsdenturin hevur verið lagdur á almennar karmar ella á kreppuloysnir. Eftir oljuprískreppuna í 70-unum vóru fleiri lond í vesturheiminum, sum fóru at stuðla fyritøkum og vinnugreinum, ið vóru fyri afturgongd, tá altjóða samhandilin minkaði. Hesi tiltøk kostaðu dýrt, tí hini londini svaraðu aftur, og tað hjálpti ikki upp á eftirspurningin. Síðan tíðliga í 1980-unum hava nógv lond tí lagt um, soleiðis at fyritøkurnar hava verið noyddar at laga seg eftir kappingini, meðan myndugleikar hava roynt at skapa karmar, sum stuðla fyritøkum í kappingini, men ikki forða fyri tillaging.

Í Føroyum hava ymisk vinnuframaamboð verið brúkt, t.d. útseting av skatti í sambandi við íløgur í partsreiðarí, útseting og frítøka fyri skatt við avseting í skattligar rakstrar- og/ella íløgugrunnar. Men tey mest brúktu amboðini hava verið vinnustudningar til útflutningsvinnur í sambandi við MYND 2 - 7[2]

kreppustýring og landskassaveðhald til íløgur í útflutningsvinnur sum fiskivinnu og farmavinnu. Nakað av vinnustudningum til fiskivinnuna er eftir enn, men burtursæð frá tí, verða hesi

[2] Myndirnar 2, 3 4 og 5 vísa árligar broytningar í landskassans viðurskiftum. Mynd 2 vísur broyting í landskassans inntøkum íroknað ríkisveitingum (eisini fyri 1988). Mynd 3 vísur broyting í landskassans útreiðslum íroknað ríkisútreiðslum (eisini fyri 1988). Mynd 6 vísur árligar broytingar í útlánum frá peningastovnum og donskum realkreditfeløgum og mynd 7 vísur árligar broytingar í ábyrgdum hjá bankunum.

vinnuframaamboðini ikki brúkt longur. Nakað av vinnuframa til ávísar vinnur liggur í frítøkum fyri mvgskyldu.

Tað er heilt vanligt aðrastaðni, at tað almenna tekur sær av ella stuðlar vøru- og framleiðslumenning. Tílíkar skipanir virka eisini í Føroyum. Í pengum brúkar landsstýrið tó væl minni til hesi endamál enn til vanligar fiskivinnustudningar.

Tey seinnu árini hava europeisk lond eisini virkað fyri at menna møguleikarnar hjá íleggjarum at meta um sín váða, tá teir gera íløgur í serstakliga partabrøv. Hetta verður gjørt við at skapa fortreytir fyri tryggum og ódýrum handli við virðisbrøvum á virðisbrævamarknaðum. Í sínum vinnupolitikki hevur Vinnumálastýrið sett sær fyri at stovna ein virðisbrævamarknað í Føroyum.

Førdur búskaparpolitikkur

Tann førdi búskaparpolitikkurin verður lýstur í fýra tíðarskeiðum, 1) tá búskapurin er í stórum vøkstri til 1989, 2) tá eftirspurningurin fellir 1990-92, 3) tá bæði eftirspurningur og útflutningur minka 1993-94 og 4) tá búskapurin aftur er í vøkstri 1995-98.




Mynd 3: Landskassans útreiðslur
Mió kr
900
800
700
600
500
400
300
200
100
0
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
høgra ás
vinstra ás
81
82
83
84
85
86
87
88
89
Íroknað ríkisútreiðslur


Mynd 4: Land og grunnar: kapital innflutningur
Mió kr
700
500
300
100
-100
-300
-500
81
82
83
84
85
86
87
88
89


Mynd 5: Landskassans veðhald, vøkstur
Mió kr
600
500
400
300
200
100
0
81
82
83
84
85
86
87
88
89


Mynd 6: Peningastovnar og kreditfeløg,
Útlánsvøkstur
Mió. kr.
2.000
1.800
1.600
1.400
1.200
1.000
800
600
400
200
0
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
høgra ás
81
82
83
84
85
86
87
88
89



Broyting í búskapinum, lyklatøl 1981-1989

1985-89

Gongdin í útgoldnu lønunum var eitt sindur skiftandi í útflutningsvinnunum frá 1985 til 89. Í 1989 vóru tær slakar 200 mkr hægri enn fyrst í 1985, men inn í millum, í 1987, fullu tær til sama stig sum fyrst í 1985. Í eftirspurningsvinnunum vuksu útgoldnu lønirnar við útvið 60% tilsamans, sum er ein sera stórur vøkstur. Bæði privatar og almennar eftirspurningsvinnur vuksu við stórari ferð.

Hagtølini fyri útgoldnar lønir fingust í lag, tá samtíðarskattaskipanin var sett í verk í 1984. Tí eru heildartølini um gongdina í búskapinum nógv betri fyri tíðina frá 1985 og fram eftir enn frammanundan. Inntøkur landskassans tilsamans við ríkisveitingum, sum síggjast í mynd 2, benda tó á, at vøkstur var eisini í búskapinum árini 1981-84.

Sum sæst í mynd 3 vuksu tær almennu útreiðslurnar sera nógv frá 1981 til 1984, millum 12% og 20% um árið. Í 1985 og 1986 vuksu tær ikki so nógv 2% - 5% pr ár. Og í 1987, 88 og 89 vuksu útreiðslurnar aftur nógv. Í 1988 bar av, tá vøksturin var 30%. Landskassans roknskapur og fíggjarlógin vóru vánalig stýringaramboð fyri búskaparpolitikkin hesi árini. Í fyrsta lagi vóru endurgjøld úr ríkiskassanum mótroknað, soleiðis at einans nettoútreiðslurnar sóust. Í øðrum lagi vórðu uppspardar grunnsetingar útreiðsluførdar, meðan nýtsla úr grunnum ongastaðni sást. Lagt er tó upp fyri hesum í mynd 2 og 3. 1984 er merkt av stórum vøkstri í studningum til fiskivinnuna. Serstakliga 1988, men eisini 1989, eru merkt av risastórum íløgum eins og stórum fiskivinnustudningum og veðhaldsútleggum hjá landinum. Tá mett verður um tølini, skal havast í huga, at inflatiónin var høg frá 1980 til 1983, men metast kann, at útreiðsluvøksturin var nakað hægri enn prís- og lønarvøksturin.

Fram til 1984, tá samtíðarskatturin varð settur í verk, øktust skattaeftirstøðurnar hjá landi og kommunum nógv, tí innkrevjingarskipanirnar virkaðu so illa. Við samtíðarskattinum varð styrkt um innkrevjingina, og eftirstøðurnar minkaðu. Hetta virkaði sum ein tátting av pengapolitikkinum.

Landið skyldaði í 1980 einar 400 mkr í útlondum, í 1981 lænti landið einar 100 mkr uttanlands (av teimum 200 mkr sum síggjast í mynd 4), m.a. við tí endamáli at veita kreppulán til fiskiflotan, sum hevði trupulleikar, men frá 1982 til og við 1986 lænti landskassin ikki nógvar pengar í útlondum, sum víst í mynd 4. Vøksturin í landsstýrisins útreiðslum varð fram til 1986 fíggjaður við vøkstri í inntøkum, sum sæst í mynd 2. Í 1987 vórðu inntøkurnar hjá landinum øktar við ymsum avgjøldum til tess at avmarka vøksturin í eftirspurninginum. Somuleiðis var fíggjarogn hjá landinum flutt av landinum til tess at minka um tað ríkiliga gjaldførið í peningastovnunum. Hinvegin var útreiðsluvøksturin í 1988 og 1989 so ógvisligur, at fíggingin mátti fáast við heimtøku av egnum og læntum peningi. Í 1989 eisini tí, at inntøkurnar minkaðu.

Landsstýrið lænti ikki sjálvt so nógvar pengar tey flestu 80-árini, sum víst í mynd 4, men veitti nógv veðhald frá 1982 til 1989, í minsta lagi 200 mkr um árið og meira í 1982 (440 mkr), í 1986 (570 mkr) og í 1988 (350 mkr), sí mynd 5. Veðhaldini vórðu veitt til vinnuligar útbyggingar í ymiskum vinnugreinum. Tey fyrru árini vórðu nógv veðhald veitt til útvegan av farma- og tangaskipum í altjóða sigling og feskfiskaskipum. Tey seinnu árini vóru nógv veðhald veitt fyri svartkjaftaskipum, rækjuskipum og frystiskipum. Meira javnt í øllum tíðarskeiðinum vórðu veðhald veitt fiskavirkjum og bussrakstri. Ídnaðargrunnurin, Menningargrunnurin, Telefonverkið og SEV læntu somuleiðis við landskassaveðhaldi. Lánveitarar, ið fingu trygdir frá landsstýrinum, vóru føroysku peningastovnarnir, danskir statsligir lánistovnar og altjóða lánistovnar.

Útlánini hjá føroysku peningastovnunum og donskum realkreditfeløgum øktust við sjeymílaferð áttatiárini. Sí mynd 6, har vøksturin hjá bankunum sæst í niðara parti av stabbanum og vøksturin hjá kreditfeløgunum í ovara parti. Frá 1982 til 1986 øktust hesi útlánini sera nógv úr 20% upp í 33% um árið. 5 ár á rað øktust útlánini meira enn 1 mia kr um árið og í trý ár umleið 1,8 mia kr pr ár. Tá var útlánsmongdin vorðin so stór, at árligi vøksturin minkaði úr 33% í 1986 niður í 10% í 1989, hóast vøksturin var meira enn 1 mia kr. Frá 1985 til 1988 vuksu ábyrgdirnar hjá bankunum somuleiðis við 400 - 600 mkr um árið.

Burtursæð frá 1985 og 1986 var útreiðslupolitikkurin hjá landsstýrinum leysur í 1980-unum, hóvligur frá 1981 til 1983 og meira stimbrandi fyri eftirspurningin í 1984 og 1987-1989. Stimbringin var eitt sindur mótvirkað av, at inntøkurnar vuksu skjótari enn útreiðslurnar. Havt varð í huganum, at ferðin í búskapinum var nakað stór, og tí varð avgjaldspolitikkurin fyri árið 1987 táttaður - júst fyri at minka um samlaða eftirspurningin.

Við loyvunum til donsk kreditfeløg at veita lán í Føroyum, var landsstýrið aktivt uppi í at lætta um møguleikarnar at fáa lán, og við veðhaldspolitikkinum tók landsstýrið eisini tapsvandan upp á seg. Á henda hátt førdi landsstýrið ein eftirspurningsstimbrandi pengapolitik.

Við veðhaldsveitingunum og kreditfelagstilsagnunum rak landsstýrið eisini vinnupolitikk. Aftaná fiskimarksútflytingarnar í 1970-unum var tað almenn fatan millum politikarar, at fiskivinnan einsamøll var ikki nóg gott vinnugrundalag. Tí veðhelt landskassin fyri útvegan av vinnutólum í øðrum vinnugreinum (t.d. altjóða farmasigling) og ótroyttum møguleikum (svartkjaftavinnu). Nógv aliloyvi vórðu somuleiðis givin við somu grund. Út móti miðum áttatiárunum fór altjóða inflatiónin og við henni rentustigið at falla. Við tilsagnunum til donsk kreditfeløg medvirkaði landsstýrið til, at fíggingarkostnaðurin hjá vinnulívinum kundi lækka.

Vinnustudningarnir vóru eisini ein partur av vinnupolitikkinum. Studningarnir øktust nógv í 1984, ma. tí at veiðan vaks. Studningarnir vórðu minkaðir nakað fram til 1987, tá fiskivinnan hevði stórar rakstrartrupulleikar. Fiskivinnustudningarnir vórðu m.a. tí øktir nógv í 1988, og vórðu síðan hildnir á høgum stigi til 1991.

Sum nevnt veðhelt landsstýrið fyri einum parti av útlánunum hjá bankunum, men útlánini hjá peningastovnunum vuksu so nógv meira enn tað, og tann vøksturin var uttan beinleiðis medvirkan frá landsstýrinum. Vøksturin í bankaábyrgdum var lutvíst við og lutvíst uttan medvirkan frá landsstýrinum. Hesar ábyrgdir vórðu í stóran mun veittar sum trygd fyri altjóða bankalánum, sum okkara bankar sjálvir fingu í lag, í nøkrum førum við landskassaveðhaldi. Sigast má, at vantandi innlit hjá bankum og myndugleikum um búskaparligar samanhangir og óvirkni frá landsmyndugleikunum vóru ein fortreyt fyri hesum útlánsvøkstri.

Tann serligi føroyski rentuskatturin fekk her ein týðandi leiklut. So leingi føroyski fíggjarmarknaðurin var avbyrgdur, og ikki bar til uttan forðingar at gera íløgur og taka lán uttanlands, fekst javnvág, tí peningastovnarnir tjentu pengar við at seta avlopsgjaldførið uttanfyri Føroyar. Altjóða fíggjarmarknaðir vórðu liberaliseraðir í 70- og 80-unum, og tað almenna og føroyskar fyritøkur fingu frælsari møguleikar at læna í útlondum. Tá altjóða rentustigið fall miðskeiðis í 80-unum, fekst meira í rentu eftir skatt í føroyskum peningastovni, enn tað kostaði at læna í útlondum eftir skatt.

Búskapurin var í stórum vøkstri frá miðskeiðis í 1980-unum. Fyritøkur í eftirspurningsvinnum løntu seg og høvdu hug at gera íløgur, tí rentan var lág. Í ávísan mun fór rein skattaspekulatión fram. Í 1989 t.d. minkaði inntøkuskatturin, hóast lønarinntøkurnar vuksu og skattalógin var tann sama. Ein tillaging av rentuskattaskipanini hevði í minsta lagi kunnað tikið spekulatiónsgrundalagið burtur, men tað varð ikki gjørt.

Freistandi er at halda, at tørvurin á búskaparligari javnvág lá ógvuliga aftarlaga í huganum, tá krøvini til búskaparpolitikkin vórðu raðfest í 1980-unum. Tey tálmandi tiltøkini, sum vórðu framd í 1987, vóru alt ov veik sammett við tey eftirspurningsstimbrandi tiltøkini, sum vórðu framd bæði fyri og eftir. Við vinnupolitikkinum, tvs. studningum og veðhaldum, vóru landsmyndugleikarnir somuleiðis við til at halda lív í og økja um vinnuligan yvirkapasitet, ikki minst í fiskivinnuni.

1990-92

Í útflutningsvinnunum broyttust lønirnar ikki nógv 1990-91, men tær fullu nógv frá fyrst í 1992. Í eftirspurningsvinnunum komu útgoldnu lønirnar í hæddina í 1989 og fóru síðan at falla frá fyrst í 1990.

Í 1989 helt landsstýrið upp at at viðmæla nýútlánum í Føroyum frá donskum kreditfeløgum. Hóast lønirnar øktust í 1989, minkaðu inntøkur landskassans, helst tí at tap av veðhaldum kundu dragast frá í skattinum, og møguliga eisini tí, at rentuútreiðslur hjá privatum og fyritøkum, sum góvu frádrátt í skattskyldugu inntøkuni, vuksu. Í 1989 varð bundin uppsparing kravd upp í eitt ár og sett í peningastovnarnar (100 mkr), avgjøld vóru hækkað (100 mkr pr ár). Í 1990 minkaðu landskassans útreiðslur 430 mkr ella 12%, meðan inntøkurnar minkaðu 400 mkr ella 13%. Serstakliga varð minkað um íløguútreiðslurnar í 1990. Útreiðslupolitikkurin varð sostatt nógv táttaður í 1990. Tað, at inntøkurnar minkaðu so nógv, mótvirkaði tó táttingini, tí landskassin hevði stórt hall og fíggjaði tað við lántøku uttanlands. Somuleiðis fekk Húsalánsgrunnurin í 1990 heimild til at víðka um sítt virksemi við ískoytislánum, sum vórðu fíggjað við lántøku uttanlands. Hetta lætti eisini um gjaldførið og váðan hjá peningastovnunum. Í 1991 og 1992 vóru útreiðslur landskassans á sama stigi sum í 1990, burtsæð frá tí, at rentuútreiðslurnar øktust av tí vaksandi skuldini og at vinnustudningarnir minkaðu 300 mkr ella í helvt í 1992. Ein triðingur av teirri bundnu uppsparingini varð afturgoldin í 1992. Inntøkurnar minkaðu, tí inntøkugrundalagið minkaði hesi bæði árini, men eisini tí, at skattatrýstið varð minkað nakað. Landsstýrið hevði stór hall, sum vóru fíggjað uttanlands. Rikin varð sostatt rúmur fíggjarpolitikkur í 1991 og 1992. Frá 1990 minkaðu veðhaldsskyldurnar hjá landskassanum, tí færri nýggj veðhald vórðu játtað, og tí landskassin hevði tap og legði út. Útlán og ábyrgdir hjá peningastovnum øktust nógv í 1989 (1,3 mia kr), í 1990 øktust tey lítið (200 mkr), og í 1991 og 1992 minkaðu útlán og ábyrgdir 400 mkr pr ár. Uttanlandsskuldin netto var í 1989 komin upp í 8,2 mia kr,

vøksturin síðan 1985 stavaði serstakliga frá privatari lántøku, men eisini frá almennari lántøku (hjá kommunum, landi og stovnum). Sí mynd 8.



MYND 8

Tað minkandi virksemið elvdi til stórt og vaksandi arbeiðsloysi, og í 1992 varð tí fyri fyrstu ferð stovnað ein arbeiðsloysisskipan í Føroyum. Hon varð stovnað við lóg eftir semju millum umboð fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum og landsmyndugleikarnar. Løntakarar og arbeiðsgevarar fóru at gjalda inn 1. apríl 1992, og arbeiðsleys fingu tey fyrstu útgjøldini 1. august 1992. Nettoávirkanin á eftirspurningin var í fyrstani neutral ella táttandi, tí løntakararnir skuldu gjalda eitt nýtt gjald, sum í miðal var nakað minni enn 2% av lønini, og arbeiðsgevararnir full 2% av útgoldnum lønum. ávirkanin frá útgjøldunum varð mótvirkað av, at landsstýrið spardi forsorgarútreiðslur. Hinvegin stuðlaði landsstýrið arbeiðsloysisskipanini ALS við 20 mkr. í stovningarfæi.

Búskaparpolitikkurin broyttist hesa tíðina frá at vera stimbrandi fyri eftirspurningin til at vera tálmandi. At uttanlandsskuldin var vorðin so stór og kreditvirðið tí nógv versnað gjørdi eisini, at verri og verri gekst hjá peningastovnum og fyritøkum at fáa lán í útlondum. Tann táttaði búskaparpolitikkurin og fíggjarstøðan í føroyska búskapinum høvdu tí við sær, at konjunkturarnir broyttust í 1989-90, og útgoldnu lønirnar í eftirspurningsvinnunum fóru at minka. Ringa lánførið hjá bankunum hevði eisini nógv at siga fyri broytingina í gongdini.

Eitt eyðkenni er, at táttingin í 1992 varð framd við at spara studningar til vinnuna. Skiparaksturin fekst ikki at bera seg, tí nøgdir og prísir minkaðu, men eisini og ikki minst tí, at studningarnir minkaðu. Hetta bendir á, at búskaparpolitikkurin hevði størri ávirkan á niðurgongdina í fiskivinnuni í 1992- 93 enn fyrr hevur verið hildið.

1993-94

Útgoldnu lønirnar í útflutningsvinnunum minkaðu nógv frá fyrst í 1992 til seinast í 1993. Fyri árið minkaðu tær hesa tíðina við 400 mkr ella umleið einum triðingi. Tá vórðu tær komnar á botn og stóðu nøkurlunda í stað í 1994. Í eftirspurningsvinnunum fullu útgoldnu lønirnar eftir einum ári í 1993 einar 450 mkr, ella út í móti eins nógv og tær minkaðu frá ársbyrjan 1990 til ársenda 1992. Í 1994 minkaðu tær einar 50 mkr afturat og komu á botn. Tilsamans minkaðu lønirnar í eftirspurningsvinnunum 1 mia kr tey 5 árini frá fyrst í 1990 til seinast í 1994.

Gongdin í búskapinum síðani 1990 gjørdi tað torført at fáa raksturin í øllum vinnum at hanga saman, bæði privatum og almennum. Tá so raksturin hjá fiskivinnufyritøkum tørnaði heilt fyri í 1992 varð greitt, at alt ov smá virði vóru aftanfyri útlánini hjá bankunum. Hetta hevði við sær, at semja varð gjørd millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina um eina endurreisingarætlan fyri bankaskipanina og almennu kassarnar. Landsstýrið skuldi endurstovna Sjóvinnubankan við lánum frá donsku stjórnini, og landsstýrið skuldi skjóta nýggjan pening í teir almennu grunnarnar. Den Danske Bank setti saman við smáeigarum nýggjan pening í Føroya Banka. Sum partur av semjuni skuldu landsstýrið og løgtingið tátta fíggjarpolitikkin fyri at minka lántøkutørvin hjá landinum. Útreiðslu- og inntøkupolitikkurin varð fyri 1993 táttaður við einum 500 mkr í mun til útrokningargrundalagið í 1992. Sum sæst í mynd 9 og 10 minkaðu vanligar rakstrar- og íløguútreiðslur hjá landskassanum meira enn 300 mkr, og inntøkurnar hjá landskassanum minkaðu hóast munandi skattahækkingar. Starvsfólk hjá landinum tóku í hesum viðfangi við eini lønarlækking uppá 8%, sum svaraði til sparing uppá 100 mkr um árið. Meirvirðisgjald, Mvg, varð sett í gildi í staðin fyri innflutningsavgjøld, og fleiri inntøkur vórðu hækkaðar, sum víst er í mynd 11. Støðan í búskapinum í 1992 var helst verri enn tær metingar, sum vóru grundarlag fyri endurreisingarætlanunum, og helst av somu grund virkaði táttingin av fíggjarpolitikkinum so ógvisliga, at raksturin hjá stórum parti av eftirspurningsvinnunum datt sundur. Av hesum versnaðu trygdirnar hjá bankunum so nógv, at teir máttu endurreisast fleiri ferðir tað árið. Í 1993 hevði landskassin 2,5 mia kr í halli í staðin fyri ta javnvág, sum ætlað var á fíggjarlógini.

Arbeiðsloysið vaks øgiligt í 1993, og samstundis flutti fólk í stórum tali av landinum. Vøksturin í arbeiðsloysinum gjørdi, at útgjøldini hjá arbeiðsloysisskipanini vuksu nógv meira enn inngjøldini. Inngjaldið varð við lóg hækkað upp í 2,75% av grundarlagnum hjá løntakarum og arbeiðsgevarum (grundarlagið er í høvuðsheitum útgoldnar lønir). Við lóg fekk skipanin til gávus stovnsfæið hjá Frítíðargrunninum undir landsstýrinum, eitt árs inngjald hjá Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunninum (1% av útgoldnum lønum), og haraftrat lán frá hesum sama grunni. Tilsamans gjørdu hesi tiltøk, at arbeiðsloysisskipanin nú virkaði stimbrandi fyri eftirspurningin, tí hon fekk inntøkur og lán, sum ikki vórðu kravd inn frá fólki og fyritøkum.

Eisini í 1994 økti landskassin um sínar inntøkur. Tiltøkini, sum munaðu mest, vóru fíggjarognaravgjaldið og lønhæddaravgjaldið. Hesi inntriv góvu einar 250 mkr í meirinntøkum, men á øðrum økjum minkaðu inntøkurnar, soleiðis at inntøkur landskassans í 1994 tilsamans vórðu 120 mkr størri enn í 1993.

Vert er at geva gætur, at fallið í eftirspurninginum steðgaði út á árið í 1994, hóast fíggjarpolitikkurin ikki var linari enn í 1993.

Gongdin frá 1992 til 1994 varð heilt týðuliga stýrd av skuldarstøðuni, sum Føroyar vóru í. Har var eingin megi í búskapinum til at venda gongdini í eftirspurninginum. Lánfærið var so vánaligt, at landsstýrið noyddist at spara í eini tíð við búskaparligari niðurgongd. Danska stjórnin kravdi tiltøk fyri at hjálpa til í 1992 og 1993. Hesi bæði árini gjørdist danska stjórnin høvuðslánveitari hjá Føroyum. Eisini í 1994 noyddist landsstýrið at tátta, meðan búskapurin var í niðurgongd, til tess at styrkja landskassans inntøkur. Høvuðsamboðini hetta árið vóru fíggjarognaravgjaldið og lønhæddaravgjaldið. Inntøkurnar til landskassan av hesum avgjøldum vórðu helst tikin úr uppsparingini hjá fíggjarstovnum og teimum húsarhaldum, sum vóru væl fyri, og ikki úr eftirspurninginum til nýtslu. Hetta sæst av tí, at

eftirspurningurin minkaði nógv minni enn undanfarin ár. Hann kom niður á sítt lægsta og fór at vaksa, áðrenn búskaparpolitikkurin varð linkaður.

1995-98

Niðurgongdin í útflutningsvinnunum steðgaði um ársskiftið 1993-94. Lønirnar øktust ikki nógv í 1994, men hava síðan verið í stórum vøkstri. Niðurgongdin í eftirspurningsvinnunum steðgaði um ársskiftið 1994-95, og lønirnar í hesum vinnum hava verið í støðugum vøkstri síðan.

Fyri bæði útflutnings- og eftirspurningsvinnurnar hevur tað óivað havt stóran týdning fyri gongdina í virkseminum síðan 1995, at fyritøkur fingu skuldarsanering ella vórðu endurstovnaðar við væl minni skuld, tá ið bankabjargingarnar vóru fingnar frá hondini. Skuldin hjá fyritøkum minkaði frá 1993 til 1996 4 - 5 mia kr, tí sambært kravjavnanum hjá Hagstovuni minkaðu fíggjarligu nettokrøvini móti føroyskum privatum fyritøkum hesa tíðina úr 7,3 mia kr niður í 2,4 mia kr.

Saneringin hevur kortini ikki sama týdning fyri útflutningsvinnur sum fyri eftirspurningsvinnur. Í eftirspurningsvinnunum bøtist raksturin hjá fyritøkunum beinanvegin, um avlopsorka fer úr vinnuni, tí umsetningurin økist hjá kappingarneytunum, um ein fyritøka minkar um sítt virksemi ella steðgar heilt. Í fiskiveiðuni á heimaleiðum og aðrastaðni fáa hini skipini ikki meira fisk beinanvegin fyri tað, um eitt skip verður lagt, tí samlaða veiðan minkar. Ikki fyrr enn fiskastovnarnir eru betri fyri, verður veiðan betri pr skip. Tapini hava verið stór, sum tølini vísa, og tey endaðu í bankunum og ikki minst hjá landinum - við bankabjargingum og effektivum veðhaldum. Av tí, at tapini vórðu ásannað, gjørdist tapsváðin fyri framtíðina nógv minni samanlagt, tí at vinnutólini fingust bíliga og skuldin var lítil. Ein týðandi partur av veiðuvøkstrinum má haldast at stava frá, at fiskastovnarnir hava verið betri fyri, men ein partur av frágreiðingini er helst eisini, at royndin er økt síðan 1993.

Í útflutningsvinnunum hevur vøkstur verið á fleiri økjum. Heimaveiðan er vaksin munandi, veiðan eftir uppisjóvarfiski sum sild, makreli og lodnu hevur stundum gingið heilt væl, og alingin hevur havt stóra framgongd. Fiskavirkini høvdu tað leingi sera trupult, men í meira enn eitt ár hava virkini meir enn so verið kappingarfør við útlendska fiskaframleiðslu. Lægri kapitalkostnaður hevur havt sín stóra lut í hesi gongdini, men lægri broytiligur eindarkostnaður hevur helst eisini havt sín lut, serstakliga fyri fiskavirkini.

Fíggjarliga hava myndugleikarnir verið minni uppi í fiskivinnuni við studningum og veðhaldum enn undan kreppuni, men ein ávísur áhugi er framvegis fyri at luttaka við almennum pengum til íløgustuðul. Veiðureguleringarnar hava elvt til nógvar politiskar trupulleikar higartil, og tí verður spennandi at síggja, hvussu fiskivinnan verður før fyri at laga seg eftir umstøðunum í framtíðini.

Frá 1994/95 til 1998 eru útgoldnu lønirnar í útflutningsvinnunum í prosentum øktar meira enn í eftirspurningsvinnunum, men í absoluttum tølum eru eftirspurningsvinnurnar øktar hálvaaðru ferð so nógv. Hetta kemur av, at eftirspurningsvinnurnar fylla meira í búskapinum. Tað merkir aftur, at tú kanst ikki brúka vøksturin í útflutningsvinnunum sum einsamalla grund fyri vøkstrinum í eftirspurningsvinnunum.

Tann parturin av útreiðslum landskassans, sum hava ávirkan á virksemið, vuksu sera lítið árini 1994, 95 og 96, ella einar 20-30 mió kr hvørt árið (sí mynd 9). Í 1997 og 1998 vuksu tær nakað meir, men eisini minni enn miðalvøksturin í búskapinum hesi árini. Hinvegin er skattatrýstið lækkað heilt munandi árini 1995, 1996, 1997 og 1998, sum víst er í mynd 11. Landskassans inntøkur høvdu kanska verið einar 400 - 500 mió kr hægri um árið frá 1998 og frameftir, um skattatrýstið varð hildið so høgt sum í 1994. Lítil ivi er um, at saman við inntøkuvøkstrinum, sum er komin frá útflutningsvinnunum, eigur lækkingin í skattatrýstinum sín stóra lut í vøkstrinum í eftirspurninginum, sum aftur hevur drigið vøksturin í eftirspurningsvinnunum við sær.

Ein part av hesum tíðarskeiðnum er skattatrýstið lækkað við teirri grundgeving, at lægri skattatrýst fremur eitt lægri kostnaðartrýst á framleiðsluna. Tað er óivað rætt í hvussu so er í longdini, at skattatrýstið hevur týdning fyri trýstið á framleiðslukostnaðin. Hinvegin bendir gongdin í búskapinum á, at eftirspurningurin er stimbraður heilt munandi av m.a. tí førda politikkinum. Lønarsamráðingarnar í 1999 benda eisini á, at vøksturin í eftirspurninginum skapar eitt størri uppgangandi trýst á framleiðslukostnaðin, enn skattalættarnir megna at halda niðri.





MYND 9 OG 10

Viðmerking til mynd 9:
Myndin vísir landskassans útreiðslur, tá rentuútreiðslur og útlegg fyri effektiv veðhald eru undantikin. Hetta verður gjørt fyri at vísa gongdina í útreiðslum, sum hava ávirkan á virksemið.

1993
- MVG verður sett í gildi pr. 1. januar 1993 við 22% og pr. 1. juli 1993 við 25%
- Rentuskatturin hækkaður til 22 %, og rentufrádrátturin lækkaður til 40 %
- Eykaskattur fyri høgar inntøkur

1994

o Lønhæddaravgjald
o Eykaskattur fyri høgar inntøkur heldur fram
o Tíðaravmarkað fíggjarognaravgjald. Av innistandandi í peningastovnunum var tað 1,9 %

1995

o Fíggjarognaravgjaldið lækkað til 0,65%, men váðkað til eisini at fevna um pensiónir
o Rentufrádrátturin av húsalánum hækkar til 44%
o Skrásetingargjaldið fyri bilar lækkar

1996

o Marginalskatturin upp til 140.000 kr lækkar, lutvíst mótsvarað av hægri marginalskatti av inntøkum millum 140.000 kr. og 300.000 kr.
o Skattaloftið lækkar frá 55% til 52%
o Rentufrádrátturin hækkar til 48%
o Fíggjarognaravgjaldið lækkar til 0,5%
o Skattalætti til pensionistar
o Skrásetingargjald verður roknað av minstavinningi við sølu av bilum

1997

o Botnfrádráttir í kommunuskatti hækka frá 12000 kr. til 17000 kr.
o Botnfrádráttir í landsskatti lækka frá 22500 kr. til 17000 kr.
o Skattaloftið lækkar frá 52% til 50%
o Skattaloftið fyri landsskatt lækkar frá 44% til 37%
o Fíggjarognaravgjaldið verður avtikið
o Skattastigin lækkaður og frádráttir avtiknir, nakrir frádráttir umlagdir til stuðul (t.d rentustuðul og ferðastuðul)

1998

o Skattalætti til fiskimenn uppí 15% av bruttolønini
o MVG undantøk fyri nógvar ymiskar vørur og tænastur

Mynd 11
Kelda: Ráðgevandi nevndin, december 1998

Meting um búskaparpolitikkin

Búskaparpolitikkur av ymiskum slagi er, sum vera man, førdur hesi seinastu út við 20 árini, og tiltøkini kunnu flokkast í høvuðsbólkarnar av búskaparpolitikki, sum eru lýstir frammanfyri.

Ávirkan á eftirspurningin

Politikkur, sum hevði meiri og minni ávirkan á eftirspurningin, er rikin í øllum tíðarskeiðnum.

Burtursæð frá 1985 og 86 var útreiðslusíðan í fíggjarpolitikkinum stimbrandi øll 80-ini frá 1981, og roynt varð at tátta nakað í útreiðslupolitikkin í 1991 og lutvíst í 1992. Útreiðslupolitikkurin var ógvuliga táttur í 1990 og í 1993-94, og tey seinnu árini hevur útreiðslupolitikkurin hjá landinum verið meira at kalla óvirkin ella neutralur. Inntøkusíðan í fíggjarpolitikkinum var óvirkin mótvegis eftirspurninginum tey flestu 80-ini. Tú kanst eisini siga, at av tí, at inntøkurnar vuksu nógv, virkaði inntøkusíðan tálmandi á privatan eftirspurning. Inntøkusíðan virkaði tálmandi í 1987, 1989-90 og í 1993-94, men var nakað stimbrandi í 1991-92 og 1995 eins og týðuliga stimbrandi í 1996-98.

Pengapolitikkurin (skattaviðgerðin av rentuinntøkum og -útreiðslum, gjaldoyrareglurnar, veðhaldspolitikkurin, almenn lántøka/uppsparing og almenn lánveiting) var samanlagt ógvuliga stimbrandi fyri eftirspurningin í 1980-unum. Hann var eisini stimbrandi tey fyrstu árini í 1990-unum,

tí landskassans hall varð fíggjað við lántøku uttanlands. Pengapolitikkurin var somuleiðis stimbrandi í 1992-93, tí 2,5 mia kr., sum vóru læntar frá statinum tvs. uttanfyri Føroyar, vórðu sprændar inn í bankarnar. Rentuskattapolitikkurin var tó táttaður munandi í 1993 og 1994, men givið varð eitt sindur út aftur, tá fíggjarognaravgjaldið varð tikið av. Við avlopi landskassans hevur hesin parturin av pengapolitikkinum verið táttandi síðan 1997, men við sera ríkiligum gjaldføri í peningastovnunum hevur pengapolitikkurin samanlagt verið rúmur síðan 1994.

Við vinnustudningum og landskassaveðhaldum virkaði vinnupolitikkurin sera stimbrandi fyri íløgu- og rakstrareftirspurningin hjá útflutningsvinnunum í 1980-unum. Nógv bendir á, at vinnustudningar gjørdu sítt til at halda uppi rakstrareftirspurninginum í fiskivinnuni frá 1988 til 1992, tá studningurin varð minkaður nógv, so raksturin hjá fiskivinnu og bankum datt sundur. Tey seinnu árini, tvs. eftir 1994, hevur vinnupolitikkurin verið meira óvirkin í mun til eftirspurningin.

Í stuttum kann sigast, at tá búskapurin gekk fram á í 1980-unum og eftir 1995 róku vit í Føroyum ein politikk, sum stimbraði eftirspurningin, og tá búskapurin fór aftur eftir hæli árini frá 1990 til 1994 róku vit ein politikk, sum tálmaði eftirspurningin. Í 1987 varð tó roynt at tálma eftirspurningin við avgjøldum. Í 1991 og 92 varð roynt at geva út í einum annars táttum útreiðslu- og inntøkupolitikki til tess at avmarka niðurgongdina í eftirspurninginum, og 1999 er fyrsta ár síðan 1995 uttan nýggjar skattalættar (tó er inngjaldið til ALS minkað 0,5% av lønunum), eins og hildið verður aftur í almennum íløgum til tess at avmarka vøksturin í eftirspurninginum. Sostatt er ein fatan av, at røkt av eftirspurninginum hevur týdning fyri gongdina í búskapinum. Hinvegin hevur henda fatan ikki verið nóg sterk til at fáa avgerandi ávirkan á javnvágina í búskaparpolitisku tiltøkunum við tí úrsliti, at politikkurin økir um ójavnvágina og sveiggini í búskapinum.

Uttanlandsskuldin var mest og sera stór í 1990, eini 130% av BTÚ. Bæði útflutningsvinnan og eftirspurningsvinnan vóru skuldarbundnar, og fíggjarorkan í bankunum var toygd á tamb. Tann stóra skuldin og tað ringa lánførið hjá bankum og fyritøkum, sum stóðst av skuldini, vóru høvuðsorsøkin til, at búskaparliga niðurgongdin byrjaði í 1990. Skuldin og tað ringa gjaldførið vóru eisini høvuðsorsøk til, at tað var so trupult at avmarka hesa niðurgongd, hóast landskassin lænti nógvar pengar í útlondum. Tí er avgerandi neyðugt at byggja upp fíggjarliga megi í góðum tíðum, so tú ert førur fyri at avmarka niðurgongd í eftirspurninginum, tá ringari tíðir koma.

Ávirkan á útboðið

Tann rikni politikkurin hevur óivað eisini havt ávirkan á útboðssíðuna í búskapinum. Ofta er tó trupult at staðfesta, hvør ávirkanin er, og tað vísir seg eisini at vera trupult at fáa semju um tað.

Vinnustudningarnir til fiskivinnuna vóru stundum stórir (upp í eini 20% av fíggjarlógini). Teir vóru ymiskir ár frá ári, alt eftir støðuni í fiskivinnuni, og reglurnar fyri studninginum vórðu ofta broyttar í 1980-unum. Vinnustudningarnir gjørdu, at fyritøkur kundu bjóða út fiskavørur á heimsmarknaðinum fyri minni enn tað, sum framleiðslan kostaði. Tann skiftandi studningurin bendir á, at tiltøk, sum bøttu um raksturin, høvdu við sær, at studningurin varð minkaður. Nógv talar tí fyri, at studningurin gjørdi sítt til at halda uppi ov stórari og órationellari orku í fiskivinnuni. Studningurin forðaði fyri, at fiskivinnan gjørdist meira kappingarfør.

Føroyskar útflutningsfyritøkur hava í nógv ár verið riknar við sera lítlari eginogn. Tað er sera freistandi at halda, at hetta hevur staðist av almennari uppílegging í kreppustøðum og stuðli við veðhaldum, tá fyritøkur vórðu stovnaðar. Tær veiku fyritøkurnar høvdu onga megi til at standa ímóti tapsváða og gjørdu tí, at tapsváðin var miðsavnaður í peningastovnum og landskassanum.

Tær stóru íløgurnar, sum vórðu framdar bæði í útflutningsvinnum og eftirspurningsvinnum í 1980-unum, gjørdu vinnurnar tungar við føstum kostnaðum og kravdu nógv størri umsetning, enn tann, sum

kundi fáast í niðurgongdini eftir 1989. Fastognarprísirnir fóru eisini nógv upp hesi árini við nógvum virksemi, bæði fyri handlaða gamla ogn og nýbygging. Raksturin hjá útflutnings- og eftirspurningsfyritøkum gjørdist tyngri og tyngri. Fiskivinnan toldi ikki at missa studningin í 1992, og trygdirnar hjá bankunum sviku álvarsliga.

Lánførið hjá fyritøkum og bankum var fyri stóran part uppbrúkt, tá 1990-ini byrjaðu, og út á árið 1992 megnaðu bankarnir ikki sítt virksemi uttan hjálp frá øðrum. At landsstýrið tók á seg at endurreisa bankarnar, og at danska stjórnin átók sær at veita landsstýrinum lán til hetta og annan fíggingartørv hjá landsstýrinum, gjørdi tað møguligt hjá bankunum at avskriva ov stóra skuld hjá fyritøkum. Lutvíst yvirtóku nýggjar fyritøkur ognirnar hjá fyritøkum, sum fóru á húsagang, og lutvíst fingu fyritøkur skuld eftirgivna. Tá henda saneringin var fingin frá hondini, hevði vinnulívið nógv smærri fastar kostnaðir at dragast við, og kundi bjóða út vørur og tænastur fyri lægri prís. Í hesum man liggja ein týðandi grund fyri tí búskaparligu framgongdini, sum hevur verið síðan 1995.

Eitt úrslit av gongdini hevur verið, at landsstýrið og kommunurnar hava fingið stóra skuld. Skuldin hjá landinum er tó lutfalsliga løtt at bera í løtuni, tí talan er um lága fasta rentu. Almenn skuld skal gjaldast aftur við innkravdum skatti, og tí hevur gjaldsførleikin í øllum búskapinum týdning fyri gjaldsevnini hjá landi og kommunum. Stór almenn skuld er tí ein trupulleiki fyri kappingarførleikan.

Eitt annað úrslit av gongdini hevur verið, at teir føroysku fíggjarstovnarnir við einum banka og trimum sparikassum eru vorðnir enn meira miðsavnaðir, enn teir vóru frammanundan. Gongdin hevur elvt til eitt sindur av iva um, hvør vil bera váðan í føroyskum vinnulívi. Í øllum førum hava vinnuligu íløgurnar verið sera lágar í nógv ár.

Tær flestu ávirkanirnar á útboðið, sum eru umrøddar, hava neyvan verið tilætlaðar við tilrættislegging av langtíðar búskaparpolitikki, men eru fylgjur av ávirkan á eftirspurningin ella avleiðingar av krepputiltøkum.

Tá arbeiðsloysisskipanin varð sett í verk, varð roynt at bera so í bandi, at ikki ov nógvir nýggir stívleikar gjørdust í bygnaðinum. Hetta er dømi um, at tað ber til at loysa tørv hjá einstaklingum og einstøkum vinnum (t.d. fiskavirkjum) og samstundis hava kappingaførleikan hjá vinnum í huga.

Samantak

Búskaparliga gongdin ella konjunkturgongdin er her lýst við gongdini í útgoldnum lønum sum grundarlag. Útgoldnu lønirnar eru sera góð hagtøl, tó høvdu nøkur viðurskifti komið betur fram, um betri tøl vóru fyri tjóðarúrtøkuna í loypandi og føstum prísum.

Tey búskaparligu tiltøkini eru lýst við gongdini í landskassans viðurskiftum, tvs. inntøkum, útreiðslum og øðrum. Ein betri samlað mynd hevði fingist av politikkinum, um samanløgd tøl fyri land og kommunur kundu verið brúkt. Uppsetingarnar av roknskapartølunum hjá landi og kommunum eru tó so ymiskar, at hetta ber illa til.

Hóast hesi fyrivarni má haldast, at ein hampilig lýsing er fingin av gongd og politikki. Ábendingar eru um, at kommunurnar eins og landsstýrið ávirka virksemið stimbrandi í góðum tíðum og tálmandi í ringum tíðum, t.v.s at tær økja um ójavnvágina og sveiggini í búskapinum.

Gongdin má sigast at vísa á trupulleikar í búskaparpolitikkinum, bæði tá tað snýr seg um ávirkan á eftirspurningin og útboðið, eins og á stýringina av váðanum, sum er í føroyska búskapinum.

Sveiggj og úrtøka

Sjónarmiðið í hesi frágreiðingini er, at tú kanst minka sveiggini í búskapinum og økja um úrtøkuna við búskaparpolitikki. Sjónarmiðið er avmyndað í mynd 12.

Mynd 12 vísir 3 beinar strikur. Ovasta beina strikan er ein idealiserað mynd av einum samfelag við møguleikum fyri vøkstri, sum brúkar allar hesar møguleikar og sum tí veksur javnt og samt uttan nakað sveiggj.

Niðasta beina strikan gongur gjøgnum eina linju við stórum sveiggjum upp og niður. Hetta samfelagið hevur somu vakstrarmøguleikar, sum fyrimyndarsamfelagið, men tað hevur stór konjunktursveiggj og kann í mesta lagi fáa eins stóra framleiðslu og inntøku og tað. Í miðal verður inntøkan væl lægri.

Beina strikan í miðjuni gongur gjøgnum eina striku við smærri sveiggjum tvørtur um beinu strikuna. Henda strikan avmyndar eitt samfelag, sum klárar at minka um konjunktursveiggj við miðvísum búskaparpolitikki. Framleiðsla og inntøka kunnu ikki verða størri enn idealstrikan vísir, men tann beina strikan liggur nærri enn í tí búskapinum, sum er meiri tilvildarliga stýrdur.

Tað, sum er at vinna við eini miðvísari konjunkturstýring, er frástøðan beint upp og niður millum ta niðastu beinu strikuna og tað mittastu beinu strikuna. Harumframt rakar ein búskaparlig niðurgongd, sum Føroyum hevur verið fyri, partar av fólkinum sera meint, fyrst og fremst tey, sum sita í ov dýrum húsum, ella av øðrum grundum hava ov stóra skuld og/ella missa arbeiði. Nakað kann vinnast við at sleppa undan so stórum trýsti á einstaklingar.

Mynd 13 vísir ta føroysku bruttotjóðarúrtøkuna í føstum prísum frá 1963 til 1997. Myndin vísir eina skiftandi gongd. Tey seinastu 20 árini minnir gongdin meira um ta illa stýrdu enn um ta vælstýrdu framleiðsluna í mynd 12.

Nógv bendir tí á, at vakstrarmøguleikar eru í føroyska búskapinum, sum ikki verða gagnnýttir, tí vit loyva búskapinum at broytast so nógv.



Mynd 12: Ein mynd av gongdini í framleiðsluni í vælstýrdum og illa stýrdum búskapi



Mynd 13: BTÚ í føstum prísum í Føroyum 1963-1997.

Útlit og búskaparpolitikkur

Búskapurin er sum nevnt í stórum vøkstri í løtuni. Útgoldnu lønirnar í útflutningsvinnunum vuksu í 1998 16% í mun til árið fyri. Í eftirspurningsvinnum vuksu útgoldnu lønirnar 8% við tí úrsliti, at útgoldnu lønirnar í øllum vinnum tilsamans vuksu 10%. Hetta er bæði í føroyskum høpi og í altjóða sammeting ein sera stórur vøkstur. Tað er tí, sum er, ikki ráðiligt at seta meira ferð á búskapin.

Skattatrýstið frá inntøkunum hjá landi og kommunum er í 1999 á leið tað sama, sum tað var í 1998, og tí er eingin stórvegis nýggj stimbring av eftirspurninginum frá skattapolitikkinum. Hetta er ein broyting frá árunum fyri, tá skattatrýstið varð minkað. Á útreiðslusíðuni er helst minni vøkstur í rakstri og íløgum hjá landinum og helst nakað størri vøkstur í rakstrar- og íløguútreiðslum hjá kommununum. Renta og fíggingarkostnaður er lækkandi. Tann avtalaði lønarvøksturin á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum gjørdist nakað størri enn prísvøksturin. Tilsamans kunnu hesar broytingar roknast at hava eitt sindur stimbrandi ávirkan á eftirspurningin, og kundu talað fyri onkrum tiltaki, ið tálmar eftirspurningin.

Vøksturin hevur verið sera stórur í útflutningsvinnunum fram til 1998, og av tí er sjálvandi komin ein strimbran á eftirspurningin. Steðgar vøksturin í veiðu og prísum, fær hetta ávirkan á eftirspurningin. Tó skal fallið vera rættiliga stórt, áðrenn eftirspurningurin ikki veksur meir ella fer at falla. Hesi

viðurskifti tala fyri ikki at gera tiltøk. Heldur vøksturin í útflutningsvinnunum fram eiga hinvegin avmarkandi tiltøk at vera sett í verk.

Íløgurnar hava verið sera smáar í nógv ár. Í danska tjóðarroknskapinum eru avskrivingarnar settar til umleið 15% av BTÚ. Kunnu hesi tøl brúkast sum vegleiðandi fyri føroyska búskapin, so minkar virðið í framleiðslutólunum, tá íløgurnar eru minni enn 15% av BTÚ. Í fleiri ár hava íløgurnar verið minni enn hetta, og heldur hetta fram, verður við tíðini bygdur upp ein stórur tørvur á íløgum. Verða íløgurnar verandi smáar, eru tær við til at tálma vøksturin í eftirspurninginum, men fara føroyskt framleiddar íløgur at vaksa, økja tær samsvarandi um eftirspurningin. Í tí førinum má sigast at vera rætt at gera nakað fyri at avmarka eftirspurningin á øðrum økjum, t.v.s í nýtsluni.

Tann stóra fráflytingin, sum var í kreppuárunum, er vend, og fólk eru flutt aftur til Føroya í ávísum tali. Í tann mun fólk venda heim aftur, er tað eisini rímuligt, at eftirspurningurin veksur. Hesi viðurskifti eiga eisini at verða havd í huga, tá politikkurin verður lagdur til rættis.

Í frágreiðingini er gjørd tann meting, at óhepnar ávirkanir á útboðssíðuna í búskapinum tvs á kappingarførleikan ofta hava víst seg, tá eftirspurningurin er øktur so nógv, at fløskuhálsar og trýst hava verið í búskapinum.

Nevnt er í frágreiðingini, at royndir hava verið gjørdar at reka ein politikk, sum javnar konjunkturarnar, bæði tá vøksturin er ov stórur, og tá íð minkingin er ov stór. Somuleiðis er nevnt, at slíkar royndir hava ikki verið frammarlaga í búskaparpolitikkinum. Hetta bendir á, at tann neyðuga vitanin er til staðar, men hon munar lítið, tá búskaparpolitikkurin verður lagdur til rættis.

Til tess at styrkja tilrættisleggingina av búskaparpolitikkinum hevði óivað verið gagnligt, um landsstýrið og løgtingið settu sær fyri at hava eina ávísa mannagongd, sum tryggjar, at týðandi viðurskifti í búskapinum verða umrødd í tinginum. Hetta kundi verið gjørt sum aðalorðaskifti um búskapin og sum fyrireiking til eitt nú viðgerðina av fíggjarlógini. Tá lógir verða samtyktar, kundi verið kravt, at viðmerkingarnar gera greitt, hvussu lógin ávirkar virksemið, og hvussu hon hóskar til búskaparstøðuna.